einfaldari
- ger tað einfaldari
September 2011

# Stórt 10 ára hátíðarhald



Mynd: Pauli Djurholm

Fríggjadagin 26. august vóru 10 ár síðan samkoman Lívdin byrjaði. Fyrstu árini var hildið til í verkhúsinum Virkni í Berjabrekku og síðan í Hoyvíkar Skúla, til flutt varð í Skúlan við Løgmannabreyt.

Føðingardagurin byrjaði við stórum Alive-tiltaki í Hoyvíkshøllini fríggjakvøldið 26. august.

Leygardagin var morgunmatur og barna-tiltak, og um kvøldið var eitt gallatiltak við góðum undirhaldi. Sunnudagin var sjálvt 10 ára føðingardagshaldið, har m.a. Pauli Høj úr Kelduni í Skálafirði og Róland í Skorini úr Ebenezer heilsaðu samkomuni. Eisini var ein heilsan frá Jógvani Gerðalíð úr Klaksvík, ið fylti 95 ár sama dag, sum Lívdin fylti 10 ár.

## Alt eri eg mentur

Paulus sigur í Filippibrævinum 4.12 “Eg dugi at vera í smáum korum, og eg dugi eisini at hava yvirflóð; við hvønn stand eri eg kunnigur, bæði at vera mettur og at vera svangur, bæði at hava yvirflóð og at líða trongd.” Tá ið Farao í Egyptalandi fekk at vita, at fyrst fóru at koma sjey feit ár, og síðani sjey rak ár, ráddi tað um hjá teimum at bera seg vísiliga at, bæði í teimum feitu árunum og í teimum raku árunum.

Í samkomuhøpi og okkara persónliga lívi fara bæði at koma feitar og rakar tíðir. Tí er tað umráðandi, at vit duga at liva og bera okkum vísiliga at í bæði feitum og rakum tíðum. Men hvussu klára vit tað? Jú, sum Paulus sigur víðari í Filippibrævinum 4.13“ Alt eri eg mentur í Honum, sum ger meg sterkan.”

*Guttorm Joensen*

# Hendingar & tiltøk

## Christmas Child nýggja heimasíðu




Christmas Child í Føroyum hevur fingið nýggju heimasíðuna: www.christmaschild.fo

## Til lukku við hjúnabandinum

Leygardagin 16. juli giftust Elsa Hansen av Eiði og Ari av Rana úr Tórshavn. Tey giftust í Ebenezer.





Leygardagin 30.juli giftust Simonika Hammer og Ragnar Djurhuus, bæði úr Tórshavn. Tey giftust í Ebenezer.

## Til lukku við barninum

19. august fingu Astrid og Ragnar Mouritsen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 4120 gr. Hon eitur Rebekka Ragnarsdóttir.



## Minibíbliuskúli og bønarmøti




Minibíbliuskúli er týskvøld í Lonini oman Hoydalar 28. Kvøldið verður skipað soleiðis, at frá kl 18.50–20.20 verður minibíbliuskúli, og frá kl. 20.30-22.00 verður bønarmøti. Vit heita á samkomuna um at halga týskvøldið til samfelag, læru og bøn.

## Skráin fyri týskvøldini september 2011

*6. september:* Finna vit Jesus í Gamla Testamenti?

*13. september:* Hvussu er Jesus bæði Gud og menniskja?

*20. september:* Kyknubólkar (Lonin opin til bøn og samveru)

*27. september:* Samtíð og umstøður Jesusar

## Gentubólkur



Í Lívdini hevur ein gentubólkur verið í fleiri ár. Talan er um árgangin 94/95/96. Genturnar eru komnar saman av og á heima hjá hvørji aðrari at síggja ein góðan film, eta eina góða máltíð og annars hugna sær og læra hvørja aðra betur at kenna. Beint eftir ólavsøku vóru tær vikuskiftistúr í Leirvík og búðu í húsunum hjá ommu og abba Kristu. Tær siga, at tað var eitt sera væl eydnað vikuskifti, har tær hugnaðu sær við spæli, gongutúrum o.ø.

Á myndini síggja vit: Aftast: Hjørdis Matras. Miðraðið: Krista Áargarð, Lív Drewsen og Randi Hansen. Fremst: Karin Elisa Djurhuus, Bjørg Viderø Johannesen, Kirstin Ljósheim og Anna Rebekka Stórá. Bjørg Krett manglar á myndini.

Komandi skúlaár sær soleiðis út hjá gentunum: Hjørdis Matras: FHS í Handilsskúlanum í Havn, Krista Áargarð: 9. flokk, Lív Drewsen: Nám X, Randi Hansen: 1. g Kambsdalur, Karin Elisa Djurhuus: 2.g Hoydalar, Bjørg Viderø Johannesen: AFS-skiftisnæmingur í USA, Kirstin Ljósheim: 1.g Hoydalar, Anna Rebekka Stórá: Fiskivinnuskúla í Vestmanna og Bjørg Krett: 1. g Hoydalar.

Latið okkum eisini hava hesar fittu gentur við í bønum okkara til Harran.

## Frá hátíðarhaldinum í Hoyvíkshøllini











*Myndir: Pauli Djurholm*

# Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

## Sunnudagin 4. september

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Evni: Tey 5 endamálini á ein barnsligan og kreativan hátt |
| | Talari: Durita Djurholm |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Endamál og visiónir |
| | Leiðslan skipar fyri |



Durita

## Sunnudagin 11. september

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Eiler Eysturtún hugleiðir |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Kvinnan skal tiga? |
| | Talari: Jógvan Zachariassen |



Eiler

## Sunnudagin 18. september

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Bólkurin ”Breiðband” luttekur |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Tú ert góður nokk |
| | Talari: Jógvan Zachariassen |



Jógvan

## Sunnudagin 25. september

| | |
|---|---|
| Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: | Rolant Utbult vitjar |
| Lovsongur og tala kl. 12.00: | Evni: Opið evni |
| | Talari: Poul Guttesen |

## Ungdómstiltøk:

Alive: leygarkvøld kl. 21.00



Poul

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*